## Oljan runnin burtur

Tað er als ikki vist, at tað er so nógv olja undir havbotninum við Lofoten og Vesterålen sum higartil hildið. Jarðfrøðingurin Bent Kjølhamar sigur við Stavanger Aftenblad, at norðmenn skulu ikki rokna við at finna nakra nýggja leið sum Ormen Lange undir Lofoten ella Vesterålen. Norska oljustýrið hevur fyrr mett, at hálv onnur milliard tunnur av olju eru undir Lofoten og Vesterålen, meðan oljuvinnan hevur mett nøgdina til meiri enn trígjar milliardir tunnur. Bent Kjølhamar sigur, at havbotnurin kann hava lyft sær á, so leiðis at oljan er runnin undan Lofoten og Vesterålen.



## USA misbrúkar Haiti

Forsetin í Venesuela, Hugo Chavez, leggur nú USA undir at gera sær dælt av teirri syndarligu støðuni í Haiti. Hann sigur seg hava lisið, at umleið 3.000 alvápnaðir amerikanskir hermenn eru komnir til Haiti, og tað er í hansara eygum tað sama sum at herseta landið. Chavez leggur dent á, at hann undirmetir ikki ta stóra hjálpararbeiðið, sum amerikanarar gera í Haiti, men at hansara atfinning einans snýr seg um teir nógvu hermenninar og vápn teirra. Barack Obama hevur sagt, at teir amerikonsku hermenninir skulu tryggja lóg og landaskil í Haiti.

# Provokatørur og undan

**Tónaskaldið Kári P og sjónleikakvinnan Laura Joensen fingu fríggjakvøldið landsins størstu viðurkenning fyri teirra listarligu og mentanarligu avrik**

MENTAN

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Tórshavnar Manskór undir leiðslu av Bjarna Restorf framførdi kenda lagið »Skygni« hjá Kára P*

Longu við sanginum »Kalli Katt« prentaðum í skránni, og sjónleikapallmyndini í einum horni og, vóru týðiligar ábendingar um, hvørji fór at fáa ávikavist Mentanarvirðisløn og Heiðursgávu Landsins handaðar í Listaskálanum fríggjakvøldið. Og onkustaðni millum áskoðararnar vóru eisini tónaskaldið Kári P og sjónleikakvinnan Laura Joensen at hóma fyri løtu seinni at standa á pallinum og taka ímóti blómutyssum og viðurkennandi orðum.

Hóast Føroya størstu føroysku mentanarviðurkenningar hava ein ávísan afturlítandi dám, man fáur vera í iva um, at sporini, sum móttakararnir av Mentanarvirðisløn Landsina og Heiðursgávu Landsins 2009 hava sett eftir seg, standa líka ljóslivandi í dag.

Í síni heiðurskvøðu til Kára P minti Rói Patursson eisini á, at hansara orð vóru hvørki ein søgulig kvøða ella afturlítandi røða - ikki minst tí vísurnar hjá tónaskaldinum raka beint í dagsins hóttanir móti teimu veiku í samfelagnum.

Eisini Jenny C. Petersen vísti á, at stóra arbeiði við at skipa ein Tjóðpall og betri kor fyri listafólk neyvan var komið so langt, var tað ikki fyri stóra arbeiðið hjá Lauru Joensen.

Sjálvt um hvørki Kári P ella Laura Joensen hava gjørt serliga vart við seg á einum listasavni, var tiltakið skipað á ein hátt, so eisini tey hoyrdu heima har eina løtu. Tórshavnar manskóri sang fyri til tveir felagssangir úr sangskattinum hjá Kára P og framførdu eisini sermerkta Kára P sangin "Skygni". Og móti endanum á tiltakinum fóri Bárður Persson og Barbara Christophersen á pall við broti úr nýggjasta leikinum hjá Tjóðpallinum »Heimsins bestu jarðarferðir«, sum Laura Joensen hevyr týtt úr svenskum.

## Kári P fekk Mentanarvirðislønina á 150.000 krónur



Landsstýriskvinnan í mentamálum lat yrkjaranum, tónaskaldinum, gittaraleikaranum og sangaranum Kára P Mentanarvirðisløn Landsins 2009 við hesi grundgeving.

Í 40 ár hevur Kári P. skapað og givið okkum listarlig virði á høgum stigi. Við beinraknum, einføldum, djúpum og fjølbroyttum yrkingum hevur hann meira enn nakar annar rúnarbundið okkum við mangan speisomu, hittinorðaðu og kenslubornu sangum sínum. Hann hevur gjørt okkum bilsin og hugsanarsom og hevur provokerað og glett okkum við tekstum, løgum og framførslum, ið eru vorðin ogn Føroya fólks.

Allastaðni fram við ringvegnum hómast í vælferðarvísunum eitt stórt álvarsemi og ein gjøgnumførd listarlig ætlan, og mann kann ikki annað enn taka undir við skaldinum, tá ið tað syngur: “hóast verðin er lítil er mín heimspeki stór”.

## Laura Joensen fekk Heiðursgávuna á 75.000 krónur



Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum, handaði sjónleikakvinnuni Lauru Joensen Heiðursgávu Landsins við hesi grundgeving:

Laura hevur verið og er eitt av undangongufólkunum innan føroyskan sjónleik.

Sum sjónleikari og leikstjóri er Laura hvørki komin til búgvið borð ella skorin klæðir. Hon hevur, síðan hon var 14 ára gomul, treiskast í hesum leiklutinum, annaðhvørt á palli, handan leiktjøldini ella í øðrum leiklutum, sum hava havt við leiklistina at gera.

Í eitt mannaminni hevur hon verið álitið og útinnandi megin í sjónleikalívinum um alt Føroya land, á bygd og í bý, í áhugaleiki og yrkisleiki, í barnaleiki og vaksnamannaleiki. Hennara leiklutur hevur heldur ikki ligið eftir, tá ið tað hevur snúð seg um at fingið leiklistarligt tilfar fram í útvarpi og í sjónvarpi. Hon hevur verið ein av hornasteinunum í leikbólkinum Grímu, Leikpalli Føroya og nú á Tjóðpalli Føroya.

Fyri hetta ófatiliga, ósjálvsøkna stríðið fær Laura Joensen, sum eina tøkk, handaða Heiðursgávu Landsins 2009.